## Lítil uggi til danska landsliðið



Eftir eitt heldur rokmikið kappingarár hjá danska landsliðnum, eydnaðist tað í kvøld liðnum at fáa eina lítla uppreisn, tá ið Ísland varð sent til hús aftur við einum 0-3-tapi í viðførinum. 19 ára gamli Nicklas Bendtner var dagsins leikari í Parkini í kvøld, tá ið Danmark vann tryggan sigur á Íslandi. Arsenal-álopsspælarin legði heimaliðið á odda í 34. minutti, tá ið hann fekk bóltin sum gávu frá einum íslendskum leikara. Minuttin áðrenn hálvleikssteðgin var tað sami Bendtner, ið setti álop í gongd, sum Jon Dahl Tomasson við sínum 50. máli fyri danska landsliðið sendi í netið. Síðsta málið átti Thomas Kahlenberg, tá ið hann tíggju minuttir eftir steðgin sløkti íslendska ljósið eftir frálíka fríspæling frá Nicklas Bendtner. Tey trý stigini kunnu tó ikki nýtast til meira enn tað, at Danmark endar á snópisligum 3. plássi saman við Norðurírlandi, sum í kvøld tapti 1-0 fyri Spania. Harvið er staðfest, at Svøríki og Spania fara til endaspælið úr bólki F.

# hjørtuni



*Súni Olsen vísti aftur evni sum føroysku miðvøllarovasti. Yvirskot var enntá til bæði skot- og gjøgnumbrotsroyndir. Eitt nú hesa, tá italska verjan noyddist at fella gøtumannin við ólógligum midlum*

steðgin. Og tá høvið beyðst, so valdi føroyska liðið at taka av.

### Hvassir í ein hálvleik

Tosið undan dystinum avdúkaði í minsta lagi tveir lutir, sum kundu geva føroysku spælarunum trupulleikar. Sjálvandi umframt kvalitetin á mótstøðuni.

Í fyrsta lagi høvdu flestu av okkara monnum als ikki spælt kappingardyst í úti við ein mánað, og alt annað líka kundi hetta væl fara at merkjast.

Harnæst var greitt, at Italia stillaði upp við einum at kalla B-liði. Og tað var so als ikki víst, at hetta fór at verða nakar fyrimunur.

Einastu av vanliga føstu spælarunum millum teir fyrstu ellivu vóru Luca Toni, sum er úr Modena, og so liðformaðurin og heimsins besti spælari í fjør, Fabio Cannavaro.

Men tá avloysararnir hjá heilt stóru stjørnunum kortini eru menn, sum vinna til vegin í feløgum sum Roma, Milan og Juventus, so er talan altso framvegis um spælarar í heimsflokki. Og tá talan so samstundis var um menn, sum væl kundu nýta høvið til at sannføra um, at teir eisini næstu ferð skulu roknast millum teir fremstu, so kundi hetta eisini geva okkara høvuðbrýggj.

Og tað gjørdi tað eisini fyrstu løtuna. Við at spæla breitt og leggja stórt trýst á óroyndu føroysku bakkarnar, skolaðu álopini móti føroyska málinum. Kanska ikki soleiðis, at talan varð um teir heilt opnu møguleikarnar, men vandastøður komu javnt og samt fyri, og eftir 10 minuttum sat bólturin í føroysku meskunum. Upptaktin var kanska óheppin, tí talan var um sjálvmál frá Fróða Benjaminsen. Men talan var samstundis um eitt sjálvmál av tí slagnum, har spælarar eru somikið trýstir, at roynt bara verður at sparka burtur, og hesa ferð varð harða innleggið frá Perrotta avrættað í málið.

Og italiumenn hildu fyri tað mesta ferðini uppi. Og tvær ferðir innan steðgin øktu teir eisini um munin. Fyrru ferðina eftir uppspæl í vinstru, og tá føroyska verjan ikki ruddað burtur, var Luca Toni skjótastur á, og so kundu lokalu áskoðararnir brøla sítt taktfasta Luca-Luca til spælarin, sum vaks upp í Modena. Og tá Chiellini løtu seinni við einum dómadagsskoti økti til 3-0, mundu fleiri av áskoðarum fara at óttast, hvat nú var í væntu.

### Holst var framúr

Men tað gjørdist so á ongan hátt verri. Føroyska liðið hevði í løtum víst gott spæl – eisini hóast stóra italska trýstið. Og sammett við 2-1 tapið á Tórsvølli fyri Italia fyrr í ár, so var talan um munandi betri skipað spæl frá okkara.

Hóast verjan til tíðir hevði trupulleikar í avspælinum, so bardust menn sum úlvar á skóg. Á sentrala miðvøllinum spældi Atli Danielsen seg bara heitari og heitari, og tó at Súni Olsen átti sín lut í 3-0 málinum, prógvaði hann í ríkiligt mát sítt virði sum spælarin, ið skal binda føroyska spælið saman. Bæði við at stýra leikferðini, skapa neyðugu skiftini og ikki minst skothóttanum, harav tann eina var um reppið at kíla seg inn um samankomingina.

Men mest av øllum var tað Christian Lamhauge Holst, sum veruliga steig fram. Tað var kanska óvæntað, at Holst var tann meira hangandi áleyparin, meðan Rógvi var heilt frammi, men hetta vísti seg avgjørt sum skilagott. Ferð eftir ferð megnaði hann at fáa skipað føroyska spælið niðaneftir. Hann tordi at bjóða av, og tá hann soleiðis fekk drigið spælarar til sín, dugdi hann eisini at finna hol til viðspælararnar.

### Rógvi og málini

Og so hevur føroyska liðið sjálvandi eisini ein málskjútta – ella – stútara – í altjóða flokki. Longu undan steðginum vísti Rógvi Jacobsen tenn. Og í einum føri enntá við at senda bóltin í netið. Ta ferðina varð fríspark tó dømt, men eftir steðgin riggaði betri.

Bæði hann og Súni høvdu nakrar vandamiklar støður, og átta minuttir fyri leiklok bragdaði. Johan Troest Davidsen sendi bóltin innfyri, og sum ikki eina ferð var Rógvi hægstur, soleiðis at hann við høvdinum kundi stýra bóltinum í meskarnar. Tíggjunda málið hjá Rógva, sum við hesum er mest skorandi føroyski landsliðsspælarin í altjóða skrásettum dystum.

Og tað kundi blivið heilt stuttligt lítla løtu seinni. Hesa ferð stóð Johan við endan av innleggi frá Christiani Høgna, men lukkutíð fyri vertirnar tók bólturin skeivu megin stólpan.

### Tóku av

Hevði munurin minkað niður í 3-2 stutt undan dystarloki, kundi talan helst verið um ein heilt stuttligan enda fyri føroyingar, men óstuttligur var dysturin tó á ongan hátt.

Italsku vertirnir sýndu seg frá byrjan frá síni bestu síðu. Hóast tað ikki er vanligt á okkara leiður, so varð føroyski tjóðsangurin møttur við støðugum klappsalvum, og eisini spælararnir á vøllinum fingu nógv rós fyri sítt avrik. Størsta klappið mundu Holst fáa, tá hann fáar minuttir fyri leiklok varð skiftur út, men sum heild vóru klappini til okkara størri enn til veritirnar, so hvørt sum seinni hálvleikur tók at líða.

Og so var tað hugaligt, at tað nú aftur bar til at hoyra føroyska 12. mannin. Teirra stuðul hevur ikki verið so eyðsýndur seinastu nógvu útidystirnar, men avrikið frá bæði spælarum og áskoðarum hesa ferð gav eina vón um, at føroyska landsliðið enn hevur stuðul.

Tann parturin veldst sjálvandi eisini um úrslit og avrik. At krevja eitt stiggevandi úrslit á útivølli móti heimsmeistarunum er kanska í meira lagi. Men avrikið, sum føroysku spælararnir sýndu hesaferð, var í nógvar mátar framúr. Viljin at ofra seg í felag var sum í gomlum døgum, og so hevði liðið eisini neyðuga dirvið at taka av, tá møguleikin beyðst. Eitt dirvi, sum eisini kundi givið enn fleiri enn tað eina málið, um væl vildi til.



*Tað var ein fragd at síggja og hoyra, at landsliðið aftur hevði ein bæði sjónligan og ljóðligan stuðul á útivølli. Nakað sum spælararnir uttan iva hava saknað seinastu ferðirnar*